Fiskamarknaður Føroya:

# Umsetningurin minkaður við 150 mió kr.

**– Seinasta árið hevur givið eitt lítið hall, men Fiskamarknaðurin er kortini hampiliga væl konsolideraður við eini eginogn, sum er út við 20 miljónir krónur, sigur John Nielsen, stjóri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár klokkan 16 helt Fiskamarknaður Føroya ársaðalfund. Á skránni var eitt nú val av nevnd, og á hvørjum ári stendur øll nevndin fyri vali. Í gomlu nevndini var Óli Jacobsen nevndarformaður, og stjóri í Fiskamarknaði Føroya er John Nielsen.

Eftir aðalfundin skipar nevndin seg, men blaðið var farið til prentingar, áðrenn fundurin í gjár varð settur.

Á skránni til aðalfundin var eisini eitt uppskot hjá nevndini um umskipan av Fiskamarknaði Føroya, soleiðis at søluliðið og landingarparturin verða tvey ymisk feløg.

Í eina tíð hevur verið uppá tal at umskipa felagið, men málið hevur higartil ikki vunnið frama, og tí eru hesar broytingar enn ikki framdar í verki.



*– Vit hava roynt at sett gjøldini, soleiðis sum vit halda tey vera mest rættvís, men hetta verður altíð ein metingarspurningur. Tað er lutfalsliga dýrari at avgreiða tær smærru nøgdirnar enn tær stóru, sigur John Nielsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Lítið hall

John Nielsen, stjóri og dagligur leiðari á Fiskamarknaði Føroya, sigur, at úrslitið hjá felagnum í farna ári er munandi verri enn seinastu undanfarnu árini.

– Eg kann siga, at vit hildu 0-punktið í fjør – ella rættari; vit høvdu eitt lítið undirskot.

Hann vísir á, at drúgva verkfallið á arbeiðsmarknaðin seinasta ár, og lágu fiskaprísirnir eru høvuðsorsøkin til, at tað ikki gekst so væl sum undarfarnu árini.

– Vit hava havt fleiri positiv ár á rað, men soleiðis er ikki í farna ári, tá ið umsetningurin var einar 150 miljónir krónur minni enn árið fyri.

John leggur tó dent á, at Fiskamarknaður Føroya er hampiliga væl konsolideraður við einari eginogn, sum er út við 20 miljónir krónur.

## Upp og niður

Tað verður altíð skiftandi uppgongd og niðurgongd í vinnuni. – Vit hava verið lastaðir fyri at taka ov nógv í okkara part, men tjena vit ikki pening og konsolidera okkum, tá ið alt gongur væl, er torført at ímynda sær, hvussu vit skulu fáa tað at bera til, tá ið tað ikki gongur so væl.

John vísir á, at Fiskamarknaður Føroya hevur nógv viðskiftafólk, og tí kann eisini roknast við, at atfinningar stundum verða vendar móti felagnum.

– Vit hava roynt at sett gjøldini, soleiðis sum vit halda tey vera mest rættvís, men hetta verður altíð ein metingarspurningur.

Hann sigur, at útróðrarmenn ofta halda seg gjalda ov nógv fyri sína tænastu, men tað, sum goldið verður, er ein avspegling av, hvat tað kostar at reka eina slíka fyritøku.

John Nielsen ásannar, at tað er lutfalsliga dýrari at avgreiða tær smærru nøgdirnar enn tær stóru nøgdirnar.

– Vit royna at gera okkara besta, men tað er torført at gera øllum til vildar samstundis, sigur stjórin í Fiskamarknaði Føroya.

# Heimsins størsti toskur

**"Ein toskur og annar", plaga vit onkuntíð skemtandi at taka til, men hvussu stórur er tann størsti veruligi toskurin, sum menn vita um er veiddur**

NOREG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Manningin á norska línubátinum, Haldis, helt seg fyrr í ár hava fingið heimsins største tosk, tá ið teir drógu ein tosk, sum vísti seg at viga 94 pund, inn um lúnningin.

Men Finnmark Dagblad veit tó at siga, at onkur toskur er áður fingin, sum er størri enn hesin.

Í 1964 hevði blaðið grein og mynd av toski, sum veiddur varð í 1930-árunum. Hesin vigaði 95 pund.

Forsøgan til tíðindini í Finnmark Dagblað í 1964 var, at ein trolari tá hevði fingið ein tosk, sum vigaði 94,2 pund. Manningin helt, at hetta mundi vera heimsmet.

Men so var ikki.

Sambært blaðnum í Finnmørkini, er størsti toskur, menn vita um, veiddur í 1960-árunum. Tað var ein fiskimaður í Gildeskål, sum tá fekk ein tosk, ið vigaði heili 104 pund.

So, hetta var ein rættiligur toskur, má sigast.



*Størsti toskurin, sum menn vita um er veiddur, vigaði 104 pund*



# Marknaðarmaður skal fáa skil á

**Landsstýrismaðurin við mentamálum hevur sett fyrrverandi maknaðarleiðaran á Føroya Tele at leiða Fornminnissavnið fyribils**

LOYSNIN
*Edvard Joensen*



*Jógvaná Lakjuni boðaði á tíðindafundi frá, at landsfornfrøðingurin hevur sagt seg úr starvi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Steffen Stumman Hansen er lækkaður í tign. Arne Thorsteinsson er endaliga farin úr starvi. Og fyrrverandi marknaðaleiðari á Føroya Tele er fyribils settur sum stjóri á Føroya Fornminnissavni.

Soleiðis gjørdist loysnin, sum Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum legði fram á tíðindafundi í Mentamálaráðnum fyrrapartin mikudagin.

Loysnin á trætumálinum, sum hevur verð á Føroya Fornminnissavni, er endað við, at bæði Steffen Stumman Hansen, landsfornfrøðingur, og Arne Thorsteinsson, fyrrverandi landsfornfrøðingur, hava seg seg úr størvum sínum.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, váttar, at uppleggið til loysnina kom úr Mentamálaráðnum. Út frá tí kann skiljast, uttan at landsstýrismaðurin vil siga tað, at menninir báðir hava fingið boð um, at soleiðis verður málið loyst.

## Skiftir starv

Steffen Stumman Hansen verður verandi í starvi á Føroya Fornminnissavni í sløk fýra ár afturat. Hetta er tíðin, sum eftir er av setanarskeiði hansara, sum var fimm ár. Hesa tíðina fer hann at virka sum vanligur savnavørður á Fornminnissavninum. Men hann fer framvegis at fáa somu løn, sum hann eftir setanarsáttmála sínum fekk sum landsfornfrøðingur.

Arne Throsteinsson er frá mikudegnum at rokna loystur úr starvi á Førya Fornminnissavni og fer beinanveg av stovninum. Eisini hann fær tó framhaldandi løn frá Føroya Fornminnissavni.

– Arne Thorsteinsson er komin ta til árs, at honum restar eitt ár í pensiónsaldur, og gjørt er av, at hann fær løn til ta tíð, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður.

Til at hava leiðsluna á Føroya Fornminnissavni komandi tíðina hevur landsstýrismaðurin við mentamálum sett Poul Henrik Poulsen. Dentur verður lagdur á, at talan er um eina fyribils starvssetan.

Poul Henrik Poulsen er 38 ára gamal og útbúgvin cand. merc. Hann hevur royndir sum marknaðarleiðari á Føroya Tele. Eisini hevur hann arbeitt í Noreg, eins og hann hevur havt egna fyritøku.

Nýggi stjórin á Fornminnissavninum hevur frá Mentamálaráðnum fingið tríggjar til seks mánaðar at fáa stovnin á rætkjøl aftur, sigur landsstýrismaurin. Tá tað er gjørt, verður tað, sum Mentamálaráðið kallar »ein vanlig leiðsla« aftur sett á stovninum.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, sigur, at tað er ikki vist, at tað verður ein fornfrøðingur, sum verður settur sum stjóri á stovninum. Men hann útihýsir heldur ikki møguleikanum fyri, at tað kann gerast tað.

## Gamlir trupulleikar

Trupulleikarnir á Føroya Fornminnissavni gjørdust almannkunnugir, tá Steffen Stumman Hansen fyri einum góðum ári síðan varð settur sum landsfornfrøðingur.

Við tíðini hevur málið mestsum ment seg til at gerast eitt persónsstríð millum hendan nýggja mannin og fólk, sum frammanundan vóru á stovninum.

Millum annað hava starvsfólkini á stovninum klagað hann til landsstýrismannin, eins og hann sjálvur hevur sent klagur um onkrar av sínum starvsfeløgum.

Sum skilst á landsstýrismanninum er ikki óvist, at tað eisini fyrr hevur verið eitt ávíst stríð á stovninum, uttan at hann kortini vil útgreina tað. Men við hesi loysnini, sum nú er vald, kennir hann seg sannførdan um, at friður verður.

Hóast tað kann tykjast, at starvsfólkini á Fornminnissavninum hava fingið sín vilja og fingið landsfornfrøðingin riknan úr starvi, sigur Jógvan á Lakjuni, at soleiðis skal málið ikki skiljast.

– Eg vil gera heilt greitt, at talan verður ikki um, at starvsfólk á einumhvørjum stovni, sum í framtíðini kanska gerast ónøgd við leiðsluna, bara kunnu senda bræv til Mentamálaráðið og so fáa stjóran avsettan, sigur Jógvan á Lakjuni.

## Líta frameftir

Landsstýrismaðurin sigur, at tað kennist sum ein lætti, at heta málið nú er avgreitt. Tí greitt er, at hetta hevur fylt nógv í gerandisdegnum hjá landsstýrismanninum seinnu tíðina.

– Hetta er nú farið, sigur hann, og nú líta vit frameftir. Nýggi stjórin hevur nú fingið sína tíð at fáa gongd á aftur gerandisdagin á stovninum. Og so fáa vit at síggja, um tað verður longri ella styttri enn tann ásetta tíðin. Vit taka ta tíð, tað tekur, sigur Jógvan á Lakjuni.

Poul Henrik Poulsen, fyribils settur stjóri á Føroya Fornminnissavni, sigur, at hann fer til arbeiðis í næstu viku. Og hann fer at vera fysiskt til staðar á Føroya Fornminnissavni hesa tíðina, hann skal leiða stovnin.



*Poul Henrik Poulsen er settur fyribilsstjóri á Føroya Fornminnissavni. Hann er 38 ára gamal og útbúgvin cand. merc*

*Mynd: Jens Kristian Vang*